

# NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK NOVEMBER 2004**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00**
**og sunnudagar kl. 14.00-17.00**
**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**

## TILTØK NOVEMBER 2004

**Fríggjadagur 05. Kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur. Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið skipa fyri.

**Leygardagur 06. Kl. 18.00**
Fimleikafagnaðurin 2004 (FO) Fimleikakapping við temanum - Bíbliusøgur.

**Sunnudagur 07. Kl. 15.00**
Fimleikafagnaður 2004 (FO) Fimleikakapping við temanum - Bíbliusøgur.

**Sunnudagur 07. Kl. 18.00**
Fimleikafagnaðurin 2004 (FO) Vinnarin verður funnin.

**Fríggjadagur 12. Kl. 19.30**
CROSSROADS, Multikulturelt musikshow fra Grønland. Atgongumerki kr. 225.- fáast á Kunningarstovuni og í Húsinum.

**Fríggjadagur 12. Kl. 14.00**
Føroya Felag ímóti Krabbameini - 25 ára hátíðarhald.

**Fríggjadagur 12. Kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur. Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið skipa fyri.

**Týsdagur 16. Kl. 20.00**
Klipp - Atlantis Bio í Klaksvík vísir filmin "Brødre"

**Mikudagur 17. Kl. 20.00**
Klipp - Filmsfelag Norðurlandahúsins vísir filmin "Brødre". Leikstjóri Susanne Bier, Danmark 2004, 110 min.

**Hósdagur 18. Kl. 20.00**
Klipp - Suður Bio á Tvøroyri vísir filmin "Brødre"

**Hósdagur 18. Kl. 12.00**
Fyribyrgingarráðið Ráðstevnu. Evnið er fólkaheilsa.

**Fríggjadagur 19. Kl. 18.00**
Mentanarvirðisløn Landsins verður latin (FO). Fyriskipari. Mentamálaráðið

**Fríggjadagur 19. Kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur, Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið skipa fyri.

**Hósdagur 25. Kl. 09.00**
Ráðstevna, Nýskapan 2004 (FO). Ráðstevna um nýskapan sum lykil til búskaparligan vøkstur í føroyskari vinnu.Fyriskipari er Virkisráðgeving.

**Fríggjadagur 26. Kl. 09.00**
Ráðstevnan "Nýskapan 2004" heldur fram.

**Fríggjadagur 26. Kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur, Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið skipa fyri.

**Sunnudagur 28. Kl. 15.00**
Bókadagurin 2004 (FO) - nyggjar føroyskur bøkur - upplestur søla - bøkur verða signeraðar. Serligur gestur á bókadegnum er Arthur Krasilinikoff við bókini "Hvalens Øje" - um barndómsdagar í Føroyum í 50 árunum.

**Norðurlandahúsið og kaffistovan eru opið soleiðis:**
**Gerandisdagar kl. 10.00-17.00,**
**leygardagar 11.00-17.00**
**og sunnudagar kl. 14.00-17.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo e-mail: nlh@nlh.fo**

# GRØNLENDSKUR TÓNLEIKUR BLANDAÐUR VIÐ HEIMSTÓNLEIK



**Crossroads er største grønlendska satsið nakrantíð uttanlands. Spennandi samanrenningin verður í Norðurlandahúsinum 12. november**

Eksotiskt, etniskt og euforiskt. Ein bráðpanna av ymiskum mentanum. Fjøltáttað tónlist smeltað saman. Nakað soleiðis kann "Crossroads", sum verður í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið 12. november klokkan 19.30, lýsast.

"Crossroads" er heitið á tiltaki, sum sprettur úr Nuuk í Grønlandi, har NAPA fyriskipaði eina fjølmentanarliga tónleikastevnu í november 2003.

Ymsar tónlistagreinar vórðu umboðaðar av tónleikarum úr ymsum londum. Teirra bakgrund var sera ymisk: Samisk joik, djembatrummur av Fílabeinsstrondini, streingjaljóðføri úr Senegal, svenskur fólkasangur, klassiskur klavertónleikur, opera, tvørfloyta, grønlendskur rocktónleikur, grønlendskur kórsangur og trummudansur úr Sibiria, Grønlandi og Alaska.

Við øðrum orðum er talan um teir bestu grønlendsku tónleikararnar, sum hava arbeitt saman við norðurlendskum starvsfeløgum, har tónleikurin er samansmeltaður, fusioneraður, á kross. Hiðani orðið Crossroads ella krossvegur. Klassiskur tónleikur møtir rocktónleiki. Meistarar hittast á trummum. Vit hoyra norðurlendskar røddir og siðvenjuberarar, sum hittast í síni egnu verð.

Higartil eru nakrar fúkandi og rúkandi konsertir spurdar burturúr á konsertferðini í Norðurlondum. Nú er túrurin komin til Norðurlandahúsið í Tórshavn, og tey, ið vilja hava nýggjan íblástur ella bara vilja verða blást ígjøgnum, kunnu fáa eina óvæntaða og heilt øðrvísi frumuppliving, lova fyrireikararnir.

Listarligi leiðarin eitur Indra Lorentzen og hon hevur samstarvað við Wolfgang Plagge, sum er tónlistarligur leiðari, ljósskaparan Øyvind Wangensteen og ljóðmannin Roy Knudsen.

Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni í Húsinum og kosta 225 krónur.

**Skráin fyri Crossroads er sera fjølbroytt og sær soleiðis út:**

- "King Island Dancers" framføra siðvandan Inuit dans og trummudans frá Nome umráðnum í Alaska.
- "Från Senegal til Setesdal" er ein norskur bólkur. Teir framføra fusiónstónleik á norskum kontra afrikanskum fólkatónleik.
- Manskórið Qissiat Kalaait frá Grønlandi. Nýgjørt manskór við djúpum røddum, ið fylgja grønlendsku kór-siðvenjuni.
- Chilly Friday frá Grønlandi, ið eru ein tann best umtókti rockbólkurin í Grønlandi við teirra heilt egna ljóði.
- Klassiskir tónleikarar frá Grønlandi, Noreg og Hollandi. Skulu í hesum tiltakinum við hesum konseptinum hava eitt møti á sama støði sum Chilly Friday.
- Cissokho & Ellika duo, Noreg, Senegal og Svøríki. Vinnararnir av BBC Music Awards, World Music 2003 í greinini "Boundary Crossing", og eisini innstillað til Nordisk Råds Musikpris 2003.
- Sameland. Við kroppinum sum gróðrarbotni og heimstónleikinum sum íblástri hevur joikarin Johan Sara Jr. funnið sín heilt serstaka hátt at framføra.
- Sibiriskur strubesangur frá Kamhatka í Russlandi.
- Indiskur Tablaspælari. Jai Shankar Sehajpal verður ofta skýrdur at vera tann dugnaligasti Tablaspælarin í Evropa.
- Eysturgrønlendskur trummudansur.
- Cirkus og gykl.
- Modernaður dansur.
- Scenugrafi-listarfólk.
- Ungdómsbólkur frá Nuuk.

## FAMILJUKONSERT VIÐ SYMFONIORKESTRINUM

Tá ið stundar til jóla fer Føroyar Symfoniorkestur at hava eitt serligt tiltak fyri børnini og familjuna í Norðurlandahúsinum.

Tiltakið verður leygardagin 4. desember og saman við symfoniorkestrinum verða frásøgumaður, jólamaðurin og stórt barnakór. Hetta er eitt samstarv millum Norðurlandahúsið, Symfoniorkestrið og Sanglærarafelagið.

Endamálið við familjukonsertini er at fáa børn og ung at lurta eftir klassiskum tónleiki og venja seg við at hoyra eitt Symfoniorkestur. Og samstundis verður hetta eitt høvi at koma í jólahýr á tann hugnaliga mátan. Á konsertini framføra barnakórið og orkestrið kend jólaløg. Eisini verður høvi hjá børnum og foreldrum at syngja við í kendu jólasangunum, og helst verður okkurt gott at fáa frá jólamanninum.

## BARNADANSUR AFTUR Í VETUR

Barnadansurin í Norðurlandahúsinum er drúgvasta tiltakið, Norðurlandahúsið hevur fyriskipað. 21. árið á rað verður í vetur skipað fyri barnadansi. Dansurin er hvørt fríggjakvøld klokkan 20. Endamálið við tiltakinum er at læra børnini kvæðaskap okkara og harvið kveikja teirra áhuga og varðveita kvæðini sum ein livandi part av okkara mentan. Tað eru Dansifelagið í Havn og Norðurlandahúsið, sum øll árini hava skipað fyri barnadansinum.



# FIMLEIKAFAGNAÐUR VIÐ BÍBLIUSØGUM

Nú stundar aftur til Fimleikafagnað. Skipað verður fyri Fimleikafagnaði annað hvørt ár, og í ár verður fagnaðurin 6. og 7. novembur 2004 í Norðurlandahúsinum.

Hetta er 10. ferð, fimleikafagnaðurin verður. Í ár verða tríggjar framsýningar. Ein leygarkvøldið 6. november kl. 18 og tvær sunnudagin 7. november kl. 15 og kl. 18.

Fimleikafagnaðurin er eitt tað største tiltakið, sum Føroya Fimleikasamband skipar fyri. Her verður fimleikur vístur á ein øðrvísi hátt. Feløgini fáa eitt evni, ið tey skulu lýsa við fimleiki og framførslu, ljóði og ljósi og samanspæli og heildarmynd.

### Evnið í ár er "Bíbliusøgur"

Átta dómarar eru valdir at døma. Fýra av hesum dómarum nýtast einki ávíst samband at hava við fimleik, men miðað verður eftir at finna dómarar við ymiskum førleikum í fjølbroyttari vinnu. Hinir fýra dómararnir velja luttakandi feløgini, og hesi fólk skulu kenna til fimleik.

Dómararnir fáa 15 - 20 minuttir eftir framførslurnar hjá feløgunum at tosa saman, og síðan leggur ein teirra fram, hvør vinnarin er.

Í ár hava fýra feløg meldað til. Tey eru: Fimleikafelagið Flog, Fimleikafelagið Støkk, Fimleikafelagið Ljósið og Havnar Fimleikarfelag. Tey hava umleið 100 luttakarar hvør í øllum aldri. Feløgini hava 15 minuttir at framføra teirra lýsing av evninum við breiddini í feløgunum.

Avgerðin, hvør hevur lýst ársins evnið "Bíbliusøgur" á besta hátt, fellur aftaná framførsluna sunnukvøldið kl. 18.00.

## EIN SEINNAPARTUR VIÐ BÓKUM OG HØVUNDUM

Bókadagurin verður sunnudagin 28. november klokkan 15 í Norðurlandahúsinum. Hesaferð kemur forvitnislig vitjan úr Keypmannahavn

Danski rithøvundurin Arthur Krasilnikov búði sum smádrongur undir Varða í Havn. Í september gav hann út bókina "I hvalens øje", sum er ein endurminningarskaldsøga um hesi barnaárini frá 1945 til 1950 í Havn. Norðurlandahúsið hevur bjóðað Arthur Krasilnikov til Føroya í sambandi við Bókadagin.

Bókadagurin er skipaður sum ein bókakafé við framsýningum av bókum, sum eru útkomnar á føroyskum hetta árið. Í ár verður eisini pallborðskjak á skránni, har føroysk ummælarahevd verður viðgjørd.

Annars minnir tiltakið um eina bókamessu, har fólk kunnu koma og fara, sum teimum lystir, síggja ella keypa bøkur og fáa sær ein drekkamunn, meðan tey lurta eftir upplestri ella samrøðum við rithøvundar um verk teirra.

Tað er Rithøvundafelagið, sum saman við Norðurlandahúsinum skipar fyri. Bókasølan stendur fyri framsýningini av bókum.




## FERÐASTUÐUL EFTIR TIL NORÐURLENDSKT SAMSTARV

Norðurlendska ráðharraráðið letur á hvørjum ári føroyingum 70.000 krónur í ferðastuðli. Enn er peningur eftir at søkja um í ár.

Tað er Norðurlandahúsið í Føroyum, sum umsitur skipanina, og peningurin verður latin føroyingum, sum eru við í sjálvbodnum norðurlendskum samstarvi.

Treytin fyri at fáa stuðul er, at minst trý av hesum londum eru við: Áland, Danmark, Finnland, Føroyar, Grønland, Ísland, Noreg, Sámaland og Svøríki.

Stuðulin verður latin einstaklingum við tí í hyggju, at viðkomandi kann tilogna sær norðurlendskan førleika, sum samstundis kann gagna einum skipaðum bólki ella felagsskapi. Latnar verða í mesta lagi 2700 krónur, og upphæddin skal nýtast til ferðaseðil. Í mesta lagi tvey fólk fáa stuðul til sama tiltak.

Umsóknir skulu sendast til Norðurlandahúsið.

## LISTASTEVNA FØROYA 2004 TAKKAR

**Áskoðarum og áhoyrarum fyri góða undirtøku. Listafólkunum, sum luttóku.**

**Grunnum og stuðlum fyri dyggan fíggjarligan styrk:**
Norðurlandahúsið
Tórshavnar býráð
Føroya sparikassi
Mentamálaráðið
Dimmalætting
Flogfelag Føroya
Atlantic Airways
Hotel Føroyar

Mentanargr. Landsins
Grunnurin Nuuk-Tórshavn-Reykjavík
Klaksvíkar býráð
Det Norske Veritas
Ísborg p/f
Skipafelag Føroya
Reyni Service

**Listastevnuvinum:**
Føroya Lívstrygging
Føroya Tele
Kaupthing Føroyar
Mjólkarvirkið
Búnaðarmanna
Postverk Føroya
SEV
Sirri pf.
SMS pf.
Tryggingarfelagið Føroyar

Øllum samstarvsfeløgum, sum gjørdu sítt til, at Listastevnan gjørdist veruleiki.
Vit hittast aftur 5.-14. august.

FILMAR, FRUMSÝNDIR Í NOVEMBER:

## BRØÐUR FARA EISINI TIL TVØROYARAR OG KLAKSVÍKAR



**Brødre verður sýndur í Atlantis Bio týskvøldið 16.november, í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 17.november og í Suður Bio 18. november. Øll kvøldini klokkan 20.**

**Klipp. Filmsfelag Norðurlandahúsins fer nú undir enn ein vetur, og fyrsti filmurin á skránni er ársins danski stórfilmur, Brødre. Umframt at verða vístur í Havn verður hann at síggja í Vági og Klaksvík**

Ársins fyrsti filmur er spildurnýggjur og danskur. Eftir tann nógv rósta Elsker dig for evigt hevur Susanne Bier fingið stóra viðurkenning fyri sín nýggjasta spælifilm, Brødre. Eitt metstórt tal av fólkum hava sæð filmin í Danmark, hann hevur longu fingið fleiri virðislønir, og nú verður hann gjørdur klárur til amerikanarar, sum hava biðið um at fingið filmin vestur um hav.




Í høvuðsleiklutunum eru Ulrich Thomsen, Nikalaj Lie Kaas saman við Hollywoodstjørnuni Connie Nielsen, sum fyri fyrstu ferð er í donskum filmi. Filmurin er sterkur, hugvekjandi og rørandi. Teir báðir brøðurnir Michael (Ulrich Thomsen) og Jannik (Nikolaj Lie Kaas) eru so ymiskir, sum teir kunnu vera. Tann fyrri hevur fullkomiliga tamarhald á sínum lívi við karrieru í herinum, vøkru konuni Sarah (Connie Nielsen) og tveimum fittum døtrum. Jannik harafturímóti livir eitt letilív og kennir dugir ikki altíð at skyna millum rætt og rangt.

Tá ið Michael verður sendur til Afghanistan fyri ST og ikki kemur afturíaftur, broytast viðurskiftini millum brøðurnir brádliga. Sarah troystar seg í ørmunum hjá Jannik, sum knappliga fær ábyrgd. Alt verður enn einaferð vent á høvdið, tá ið Michael vendir heimaftur frá skelkandi fangalegu í afghansku fjøllunum.

Susanne Bier hevur latið altjóða kreppurnar, sum vit hava upplivað seinastu árini, fáa ein týðandi leiklut í filminum. Hon sigur sjálv soleiðis um filmin: "Filmurin snýr seg um broytingina í heimsmyndini, sum er hend í okkara samfelagi. Ein viðurkenning av, at kríggj og yvirgangur eisini eru okkara millum, og at vit ikki longur eru ein lítil vardur alheimur."

Søguna hevur hon ment saman við leikritahøvundinum og leikstjóranum Anders Thomas Jensen, og filmurin er upptikin á støðum í Keypmannahavn og Almera í Spania.

Tað er við stórari gleði, at filmsfelag Norðurlandahúsins bjóðar tann kanska mest umrødda norðurlendska filmin í ár til føroyingar, ikki bara í Havn, men eisini í Klaksvík og á Tvøroyri.

Brødre verður sýndur í Atlantis Bio týskvøldið 16.november, í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 17.november og í Suður Bio 18. november. Øll kvøldini klokkan 20.